## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MUNNKURV ER IKKI GÓÐUR POLITIKKUR

Samgongufólk skulu ikki viðgera játtanarkarmin í fjølmiðlunum!

Tað siga bæði fíggjarmálaráðharri og løgmaður við ein munn. Hetta siga teir í kjalarvørrinum á tí, sum Sosialurin skrivaði fyri trimum vikum síðani um, at Javnaðarflokkurin ikki góðtekur, at røktarheimspláss verða niðurløgd. Kringvarpið hevur viðgjørt sama mál nú um dagarnar bæði í sjónvarpi og útvarpi.

Tað ber sjálvandi til at skilja boðskapin hjá hesum báðum politisku leiðarunum, tí tað verður sera trupult at fáa nakra semju um fíggjarlógina, um øll spariuppskotini skulu viðgerast út í æsir í miðlunum. Men tað er nú so, at tá vit hava eina samgongu og ein samgonguleiðara, so eigur hesin persónurin at hava so mikið gott tak á sínum samgongu- og ikki minst floksfeløgum, at hetta var ikki neyðugt. Men her tykist at halta hjá løgmanni, ikki minst innanfloks, har ávísir tingmenn alla tíðina sleppa at koyra fríspæl við sær sjálvum í fokus.

Viðvíkjandi aktuella málinum um røktarheimspláss, so ber ikki til hjá hvørki løgmanni ella fíggjarmálaráðharra at snakka seg burtur úr, at tað sum samgongan er í ferð við at gera er at spara nøkur røktarpláss burtur. Gamaní verður eingin røktarsjúklingur koyrdur á dyr – men samgongan brýtur lyftið um, at bygging av nýggjum røktarheimum skal útvega tilsvarandi fleiri røktarpláss.

Men Javnaðarflokkurin – í øllum førum Hans Pauli Strøm umboðandi tingmanningina – hevur gjørt púra greitt, at flokkurin tekur ikki undir við hesum. Einki annað var náturligt, enn at Javnaðarflokkurin segði so. Vælferðartænasturnar hava verið legitimiteturin hjá Javnflokkinum øll árini, og flokkurin vann sær støðuna sum stjórnarberandi flokkur við fólkapensjónini til valið í 1958. Ta støðuna hevði flokkurin fram til 1994, tá flokkurin leið ein søguligan knúsandi ósigur, júst eftir at flokkurin hevði pilkað við fleiri av vælferðartænastunum.




Vit eru tó ikki samd við løgmanni og fíggjarmálaráðharra um, at játtanarkarmurin ikki skal viðgerast í fjølmiðlunum. Vit vilja fegin lýsa allar ætlanirnar hjá landsstýrinum, og vit vilja eisini sleppa at seta teir røttu spurningarnar – serliga áðrenn avgerðin verður tikin. Tað er satt demokrati.

At tað skal gera tað trupult hjá løgmanni er tekin um, at hann ikki hevur stýr upp á tropparnar hjá sær, og at landstýrisfólk og løgtingsfólk ikki tosa nóg nógv saman.

**Samgongan brýtur lyftið um fleiri røktarpláss**

# Livar fór fyri borð

Livar Nysted og teir, sum rógva tvørtur um Atlantshavið, hava verið í illveðri um vikuskiftið . Vindurin var 20 m/sek við glæðum upp í 25 m/sek. Leygardagin fór báturin hjá teimum runt í illveðrinum, og Livar varð tveittur fyri borð. Hann hevði tó línu á sær, sum allir hava umborð, og svam aftur til bátin.

– Nú hitar hann seg aftur í einum soviposa, men veri ikki stúrin. Alt er í lagi her. Allir eru tryggir og heitir, skrivaðu teir av bátinum til heimasíðuna trip.fo leygardagin.

– Norðuratlantshavið fór ongantíð at lata okkum koma ígjøngum uttan hesa royndina, og vit hava bíðað eftir hesum allatíðina. Men tað hevði verði deiligt at sloppið undan.

Í gjár var veðrið batnað somikið, at teir kundu fara at rógva aftur. Í gjár høvdu teir lagt slakar 3700 kilometrar aftur um seg, og fyri framman bíðaðu góðir 1500 kilometrar.



**Gleði meg til friðin umborð**

DURITA JOENSEN
SÍÐA 46-47



**Føroyingar onga orsøk til grenj**

ARNE WINTHEREIG
SÍÐA 42-43

# Facebook stríðist við spøkilsi

Heimsins størsta sosiala netverk, Facebook, hevur ein trupulleika. Fólk, sum eru deyð, liva víðari við sínum profilum á Facebook, og í heilum fáa vinir sjálvvirkandi áheitanir frá Facebook um at halda sambandið við líka við hesi fólk.

– Hetta er eitt sera eymt evni, og sjálvsagt er tað svárt hjá fólki at síggja sínar deyðu vinir á Facebook, sigur ein talskvinna fyri Facebook við New York Times.

Facebook hevur roynt ymiskt fyri at fáa bilbukt við trupulleikan, og arbeitt verður framhaldandi við tí. Heitt verður eisini á fólk um at gera vart við seg, um tey síggja profil hjá onkrum deyðum fólki á Facebook.



# Hundur illur inn á standmyndina

Sunnukvøldið sat ein hundur á einum parkeringsbási á Skálatrøð í Havn frá sær sjálvum og goyði.

Ein politistur fór oman í bili, men hann vildi ikki fara úr bilinum, so illur var hundurin.

Hann koyrdi yvir móti hundinum, sum tók til beins, og politibilurin aftaná.

Hundurin steðgaði við eini hús, og tá politiið ringdi til húseigaran, váttaði hesin, at hundurin var hansara.

Hundurin var stungin av heimanifrá. Eigarin segði, at hundurin hevði tað við at fara oman á Skálatrøð, tí hann kundi ikki torga standmyndina niðan fyri Smiðjuna í Lítluvík. Tað var tí, at hann hevði goyð.

Eigarin var fegin um, at hundurin kom heim aftur í øllum góðum.

*randi@sosialurin.fo*

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo